

## Trongligt á Oyggjarvegnum

Frá klokkan 16 í dag er Kaldbaksvegurin er opin aftur, og tað eru tað uttan iva mong, sum fegnast um. Týsmorgunin klokkan níggju stongdi Landsverk vegin fyri allari ferðslu. Hetta vegna arbeiði hjá Fjarhitafelagnum á strekkinum millum Sund og íbindingina í Kaldbaksbotn.
Í 31 tímarnar var ferðslan leidd eftir Oyggjarvegnum, og har gjørdist til tíðir rættiliga trongligt. Eitt nú í morgun, tá henda myndin var tikin og røðin av bilum stóð frá íbindingina millum Oyggjarvegin og Ringvegin og langt niðan um Hotel Føroyar.

## Dimma steðgar dulnevndum lesarabrøvum

Tá Árni Gregersen tók við sum blaðstjóri á Dimmalætting varð beinanvegin gitt, at nú var liðugt við dulnevndum lesarabrøvum. Í Dimmu í gjár varð endaliga staðfest, at so er. – Opinleiki og vitan um hvønn tað er, ein kjakast við, er bert eitt rímiligt krav í dag, og er við til at hækka støðið í kjakinum. Dimmalætting vil vera við til at hækka støðið á henda hátt. Navn undir øll lesarabrøv, stendur millum í oddagreinini í týsdags Dimmu. Tað er í ár tíggju ár síðani, at Sosialurin strikaði dulnevndu lesarabrøvunum.

Mannarættindi:

# Amnesty kannað 153 lond

**Fyri viku síðani legði aðalskrivarin hjá Amnesty International, Irene Khan, árligu frágreiðingina hjá felagsskapinum á tíðindafundi í London. Frágreiðingin lýsir mannarættindastøðuna í 153 londum í 2006.**



*Altjóða felagsskapurin, Amnesty International, hevur fleiri ferðir átalað fangaleguna á Guantanamo á Kuba, har hundraðtals fangar í áravís hava bíðað eftir rættargongd. Fangarnir vórðu tiknir eftir innrásina í Afganistan í kjalavørrinum av 11. september álopinum á World Trade Center í New York og Pentagon í Washington í 2001*

Høvuðsboðskapurin hjá Irene Khan var, at førdi politikkurin í 2006 í stóran mun var bygdur á ótta. Bæði sterkar stjórnir og vápnaðir bólkar nýttu ótta sum grundarlag fyri teirra politikki og á henda hátt fostraðu eitt umhvørvi merkt av ótollyndi og spjaðing og hervið løgdu lunnar undir fleiri kreppur og mannarættindabrot.

Árið var, eins og undanfarin ár, merkt av trygdarætlanum, sum í mongum førum bygdu á ótta. Óttin fyri yvirgangi, sum legði lunnar undir »stríðið móti yvirgangi« og óttin fyri hópoyðingarvápnum, sum førdi til innrásina í Irak, skapti djúpar gjáir, ið kastaðu skugga yvir altjóða samstarvið. Hetta hevði við sær, at altjóða samfelagið ikki nýtti nóg nógva orku at viðgera og fyribyrgja stóru mannarættindakreppurnar í millum annað Darfur, Ísrael og hersettu økjunum, Libanon og Sri Lanka.

Londini í Evropa eru einki undantak, og her er tað serliga »stríðið móti yvirgangi«, rasisma, mismunur og strangi innflytarapolitikkurin, sum hevur vakt ans hjá Amnesty. Nærum øll ES londini, harímillum Danmark, eru nevnd í ársfrágreiðingini hjá Amnesty fyri 2006.

Frágreiðingin varpar ljós á, hvussu politikarar hava gjørt dælt av óttanum fyri ótálmaðum streymum av flóttafólki og innflytarum og hava nýtt hendan ótta sum grundarlag fyri strangari útlendingapolitikki, meðan gestaarbeiðarar kring heimin framhaldandi eru verjuleysir, hóast teir stórliga verða misnýttir.

Irene Khan tók eisini fram sigrar og vísti á betraðar broytingar í 2006. Hon vísti til dømis á avgerðina hjá Evroparáðnum um at heita á øll limalondini um at kanna loyniligan fangaflutning í Evropa og á avgerðina hjá ST um at fara undir at menna ein altjóða løgfrøðiliga bindandi sáttmála, sum skal fáa tamarhald á stóru vápnaútbreiðsluni kring heimin. Útflýggjanin av fyrrverandi forsetanum í Liberia, Charles Taylor, til »Special Court for Sierra Leone«, har hann verður ákærdur fyri krígsbrotsverk og brotsverk móti mannaættini eru tekin um betringar, tá tað snýr seg um at tryggja altjóða rættvísi. Kravið um rættvísi sigraði somuleiðis, tá Thomas Lubanga, sum hin fyrsti, varð handtikin og útflýggjaður til Altjóða Brotsmannadómstólin, har hann verður ákærdur fyri at hava útvegað og nýtt barnahermenn í stríðnum í Kongu.

Frágreiðingin vísur somuleiðis, at rákið er við at venda, tá tað snýr seg um deyðarevsing, og at alt fleiri lond avtaka deyðarevsing. Filipsoyggjarnar gjørdust sostatt land nummar 99, sum avtók deyðarevsing fyri vanlig brotsverk í 2006.

Aðalskrivarin endaði við at vísa á framtíðarmøguleikarnar hjá nývaldum leiðarum at skapa betraðar broytingar og mælti til, at nýggja kongressin í USA gekk á odda og vísti veg, tá tað snýr seg um at endurvinna virðingina fyri mannarættindum í egnum landi og uttanlands.

*Kelda: www.amnesty.fo*

## Bilar í morgin

Vegna plásstrot verða bilasíðurnar í blaðnum í morgin hósdagin 31. mai.

*red.*